HEILSANIR

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 9. aug. 2003 minnisríkan og ógloymandi.
Lina og Mikkjal Petur Næs

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á silvurbrúðleypsdegnum 21. apr. 2003 og gjørdu okkum dagin ógloymandi.
Eyðna og Tomas

Góða omman
Hjartaliga tillukku við degnum 12. okt. Minnist tú, tá ið eg tók hesa myndina? Eg gleði meg til tú kemur.
Heilsan Monika

Góða Noomi-omman
Tillukku við degnum ynskja Svanna, Tummas og Markus. Eisini ein heilsa til Jonhild ommuna, ið fylti 60 ár í summar

Góði elskaði Erling
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum í dag 11. okt.
Bestu heilsanir mamma, babba, Hannelina og Elsa

Góði elskaði Erling
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum í dag 11. okt.
Bestu heilsanir omma, abbi og ommubeiggi

Hey abbi
Hjartaliga tillukku við 50 ára føðingardegnum. Eg eri so góð við teg.
Heilsan
Marianna, mamma og babba

Góði Markus
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Eisini ein heilsa til Elsu Sørensen við 19 ára degnum í dag.
Ynskir Angeleen mostir og Palli

Góða elskaða Óluva
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta ári. Vit elska teg.
Ynskja omma, fastir og babbaba

Góði elskaði Dávid
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum. Jesus signi framtíð tína.
Ynskja mamma, babba og Elin

Góði Sámal Petur
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 12. okt. Alt gott í framtíðini. Eg elski teg.
Annika

Góði abbi
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 12. okt. Takk fyri alt tú er fyri okkum.
Bestu heilsanir Ásbjørn, Heri, Oddfríða og Helena

Góða elskaða Linda
Her situr tú gott, ha? Hjartaliga tillukku við 16 ára føðingardegnum, sum var 9. okt.
Ynskir systir tín
PS. Góða veitslu í kvøld

Góða Linda
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum tann 9. okt. Vóni tú fært ein góðan dag. Vit gleða okkum til í kvøld.
Heilsan Argjadiddirnar

Góði elskaði Eiler
Hjartaliga tillukku á tínum 7 ára føðingardegi. Nú mást tú verða so raskur í skúlanum. Jesus pápi signi teg.
Kærar heilsur mamma, Páll og Tóki

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

TILTØK

Gudstænastur Leygardagin 11. okt.
kl. 15, grønlendsk gudstænasta v/ Jens Christian Kleist
17. sunnud. e. trinitatis
Havnar kirkja: kl. 11, konfirmatión, Sonja Klein
Nólsoy: kl. 12, Erland Beder
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen, konfirmatión
Argja kirkja: kl. 11, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
Vestmanna: kl. 11 konfirmatión, Inga Poulsen Dam
Miðvágur: kl. 11, Bjarni Bæk
Kollafjørður: kl. 12, Mogens Tilsted Christensen. *Broytt kirkjutíð í Kollafirði: Frá sunnudegnum 12. okt. verður farið í kirkju kl. 12*
Norðskála: kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
Gøta: kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
Søldarfjørður: kl. 11, Meinhard bjartalíð. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan
Hvannasund: kl. 12,
Viðareiði: kl. 14, barna- og familjugudstænasta. Elsa Funding. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
Christianskirkjan: kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
Vágur: kl. 11, altarg., Patrick de Neergaard
Tvøroyri: kl. 11, altarg., *Fámjin:* kl. 18, altarg., Jónsvein Bech. Á Tvøroyri og í Fámjin gongur talvan fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
Porkeri: talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
Selatrað: kl. 11, konfirmatión, Jógvan Friðriksson
Sandur: kl. 11, konfirmatión, Jákup R. Hansen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini

Katólska kirkjan
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Pater Wolf Schmidt í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúlin kl. 14.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Vegna heystfrí verður eingin sunnudagsskúli.

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Fríggjakvøldið kl. 20 verður JC Teens – spennandi ungdómsmøti har nógv ymiskt er á skránni. Øll ung eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli, eisini verður kaffi. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 13. okt. kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
12. okt. Møti v/ Jóannis Fonsdal, Vestmanna.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Símun Absalonsen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Mikukvøldið kl. 19 Delli.
www.filadelfia.fo

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikudagin einki AWANA.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 við Absalon Áargarð og kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Jógvan Z. talar um evnið: Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – Efesus. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Drekkamunnur er millum bæði møtini.
Týskvøldið onki møti vegna heystfrí. www.livdin.fo

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Erland Beder presti.
Týsdagin verður onki várgleði vegna heystfrí.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13
Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v. Torstein Johannesen, Manskórið syngur.

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 11. okt. kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

Missiónshúsið í Miðvági
Sunnudagsskúlin hevur loppumarknað leygardagin kl. 13-18. Ungdómsmøti er leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

BRÚDLEYP

Sunnudagin 12. oktober giftast í USA, Kate Serino og Pauli Nolsøe, Kaldbak. Brúdleypsadr.: 81B Commerce Street Clinton, CT06413 USA.

Leygardagin 25. oktober giftast Marita Danielsen og Høgni Olsen, bæði úr Havn. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 15. Døguröi verður í Pálsstovu fyri innbodnum kl. 17. Aftaná kl. 22 verður opið hús. Tey, ið hava hug at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at boða frá á tlf. 318086 ella 218023 í seinasta lagi 18. oktober.

Leygardagin 25. okt. kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Unn Jacobsen, Nólsoy og Glenn Perdomo, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma við til veitsluna, verða biðin um at siga frá innan 11. okt. á tlf. 314714, 221778 ella 327052.

GULLBRÚDLEYP

Fríggjadagin 17. oktober hava Sólrun og Jóannes Rubeksen, Tórshavn gullbrúdleyp.
Dagurin verður hildin í B36-húsinum frá kl. 10 til 15. Ætt, vinir og kenningar eru hjartaliga vælkomin.

Fríggjadagin 14. november hava Solveig og Árni Johansen í Svanga 32, Tórshavn, (fyrr Marknagilsvegur 59) verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Pálsstovu leygardagin 15. november kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 1. november á tlf. 312409 ella 212409.

SILVURBRÚDLEYP

14. okt. hava Sigfríða og Ingvard Lamhauge, Saltangará verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 18. okt. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 447855 ella 264111 áðrenn 11. okt.

14. oktober hava Marjun Vilhelm og Páll Poulsen í Tórshavn verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Grikkalandi.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 11.10. Runavík tlf. 44 80 16
Sunnudagin 12.10. Runavík tlf. 44 80 16

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.